
Jólakalendarin 91

Nú halda vit fram við jólakalendaranum. Vit hava fingið nógv svar frá lesarunum, har gitt verður, hvør persónurin er. Hesir verða so við í lutakastinum um ein eykavinning, sum er ein eskja við karamellum og tær tríggjar bøkurnar við skemtitekningunum hjá Óla Petersen.

Vit halda so fram við at lata lúkur upp fram til jóla. Tá allar lúkurnar eru latnar upp, skulu fólk, sum vilja vera við í lutakastinum um tann stóra vinningin, senda okkum lidna kalendaran. Treytin fyri at vera við er tann, at fólk klippa út lúkurnar og líma tær á kalendaran og senda okkum.

Vinningurin er eitt krov og so tær tríggjar skemtibøkurnar við tekningunum hjá Óla Petersen.



Lesarabrøv

Sjúklinga kærustovnur

Ein rættleiðing til Tíðindablaðið Sosialin.

Í Sosialinum 3/12-91 var lesarabræv viðv. Kærustovni yvir avgerðarrættindi, ið Almannastovan nú umsitur.

Í hesum sambandi kom eg eisini inn á málið viðvíkjandi **Sjúklinga Kærustovni.**

Og ikki sum Sosialurin endurgevur í blaðnum ein sjúkrahús kærustovn/stýri, — her er rætt stórur munur, tí hesa rættleiðing.

Og fyri at øll skulu skilja munin, skal eg her greiða frá sjúklinga kærustovninum, og hvat hesin stovnur verður nýttur til.

Ein sjúklinga kærustovnur/nevnd — er í øðrum londum ein stovnur, sum sjúklingar kunnu venda sær og kæra, fyri síðan at krevja endurgjald.

Um sjúklingurin hevur liðið vanrøkt, og sum fylgi av vorðin invalidur — er óarbeiðsførur í stytri ella longri tíðarskeið — ella kanska fyri lívstíð?

Grunda av manglandi viðgerð, ov seinari viðgerð, skeivari viðgerð, hendiligum óhapi, læknaligum ósketni, manglandi kunnleika, líkasælu — og ikki minst præstice — og manglandi samstarvsevni/vilja, innanhýsis, — og sjúkrahúsanna millum.

Eins og í øðrum londum hava eisini vit í Føroyum trupulleikar á ymsum økjum — og tí er eisini tørvur her hjá okkum — fyri at hava kærustovnar, sum skulu verja borgaran — um og tá brúk er fyri at kæra, og tá fólk vera kastað ímillum hesar báðar stovnar, Almannastovuna og heilsuverkið, sum nú eru fløkt saman í ein vavgreyt.

Sum nú er, kann ein sjúklingur ella familjan kæra til Det Danske sosial og sundhedsstyrelse, — og hevur onkur nokk roynt tað.

Men eyðsæð er tað, at um vit skulu hava okkara demokratisku rættindi sum borgarar í einum demokratiskum og á fólkaræðisliga stýrdum landi, so er heilt greitt, at fólkið, sjúklingurin, tey brekaðu, mugu verjast og hava síni rættindi.

Tí er eisini her hjá okkum nú stórur tørvur á kærustovnum og kanska mest her hjá okkum, hvar øll kenna øll og inhabiliteturin er so útbreiddur, og man finnur somu menn sitandi og viðgera sínar egnu avgerðir frá stovni í stovn og landsstýrið og aftur í stovn/ stovn, — frem og tilbage, lige langt.

Tí sjálvsagt er tað, at í hesar kærustovnar skulu ikki sita fólk, sum starvast innan sjúkrahúsverkið ella almannastovuna, — tá tey munnu metast sum inhabil, og má landsstýrið í ein vissan mun eisini sigast at vera inhabilt, tí landsstýrið umsitur Almanna- og Heilsumál og eigur stjóran fyri somu stovnar.

Umframt ráðgevara, ið er lækni við heilsuverkið, og sum má sigast at vera sera inhabilur í nógvum nevndum.

Ketty Viderø

Til øll brúðarpør

Sendið okkum brúðarmyndina og tit fáa hana í blaðið ókeypis.

Sosialurin ynskir tykkum hjartaliga tillukku við brúdleypsdegnum og bliðan byr frameftir



Vit vildu fegin sett brúðarmynd av tykkum í blaðið, har tit eisini fáa møguleika til eina heilsan til tey, sum mintust tykkum á brúdleypsdegnum.

Vit senda myndina aftur beinanvegin.

Sendið myndina til:
Sosialin
postrúm 76
110 Tórshavn